LM-099/2023

Hagapartarnir Mykines
388 Mykines
E-mail: mykines.tourist@gmail.com

Fylgiskjal 92

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Tórshavn, 22. februar 2024

Hoyringssvar til uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)
Mykines hevur í sera nógv ár verið eitt av best umtóktu plássunum hjá ferðafólki og føroyskum ferðasmiðjum at vitja og vinna pening frá.

Talið av ferðafólki var ikki so høgt, at tað órógvaði náttúru, fugla- og dejóralív ella bygdarfólkið, men tá farið var undir at marknaðarføra Føroyar sum ferðavinnumál øktist talið av vitjandi munandi. Ein viðvirkandi orsøk vóru óhepnu orðingarnar í marknaðarherferðini hjá Visit Faroe Islands, at tað var frítt at fara allastaðni og í Mykinesi serliga, at vitin í Mykineshólmi nærum einsamallur varð nýttur í marknaðarføringini.

	2013-2023	2023	2022	2021	2020	2019	2018	2017	2016	2015	2014	2013
Tal av gjaldandi ferðafólkum	38.926	9.035	7.260	3.134	2.659	9.152	6.393	1.293	0	0	0	0
Tal av seldum ferðaseðlum, sambært SSL	201.615	24.382	21.717	16.782	10.614	29.421	19.790	20.629	19.530	16.018	12.704	10.028
Gjaldandi ferðafólk *)	**38,6%**	**74,1%**	**66,9%**	**37,3%**	**50,1%**	**62,2%**	**64,6%**	**12,5%**	**0,0%**	**0,0%**	**0,0%**	**0,0%**

*) Roknað í prosent og at tann ferðandi ferðast aftur og fram við SSL

Nógv tann størsti parturin av ferðafólkunum koma við Jósup, ið rekur rutuna út til Mykinesar vegna Strandferðsluna. Talvan omanfyri vísur talið av seldum ferðaseðlum til og úr Mykinesi 2013 – 2023. Tølini vísa ein støðugan vøkstur í tali av ferðafólki, undantikið tó í 2020 og 2021, vegna Covid 19.

Arbeiðið við at fáa økir í Føroyum góðkend sum Ramsar økir tók dik á seg í 2010. Í 2012 vórðu Mykines saman við Nólsoy og Skúvoy útnevnd sum Ramsar økir, og í 2015 varð skipað fyri fyrsta Ramsar fundinum í Mykinesi.

Á fundi í juni 2016 heittu almennu umboðini í Ramsar nevndini á hagastýrisformennirnar um at orða eina ferðavinnuætlan ella leiðreglur, hvørs endamál var at avmarka neiligu ávirkanina økta ferðafólkatalið mett varð at hava á lundastovnin úti í Lamba.

Hagastýrisformennirnir samdust um at leggja eitt uppskot fyri komandi grannastevnu, sum hevði til endamáls at sleppa av við óskipaðu gongdini uttanfyri bøgarðarnar í Mykinesi og at taka gjald frá ferðafólki.

Í telduposti til sýslumannin varð grundgivið soleiðis:

"Mykines er eitt áhugavert ferðamál, men samstundis er lundin felags lunnindir, sum eigararnir fegin ynskja at verja og fáa ágóðan av. Seinastu nógvu árini hevur grannastevnan sett forboð fyri at fara á fleyg og harumframt eru samtyktar ásetingar um, hvussu fleygingin skal skipast. Alt hetta hevur verið gjørt í felag og hevur hepnast eftir vild.

Hagapartarnir Mykines
383 Mykines
E-mail: mykines.tourist@gmail.com

Seinnu árini hava eisini víst, at hesi lunnindi kunnu nýtast til annað enn matna, nevnliga í ferðavinnuhøpi. Lundastovnurin sær út til spakuliga at vera í menning, men tað er umráðandi at stovnurin fær møguleika at mennast enn meira. Tað er við støði í hesum báðum atlitum, at vit ynskja at skipa gongurættin í Mykinesi framyvir.

Tískil verður skotið upp fyri grannastevnuna, at gongurætturin í haganum/útum sjálva bygdina í Mykinesi verður avmarkaður í tíðarskeiðinum frá 1. maj - 31. august. Avmarkingin er ikki galdandi fyri fólk, ið eru arbeiðsørindir, t.d. rakstur, viðlíkahald og eftirlit av vatnverkið, el- og samskiftisútgerð ella vitanum v.m.

Skotið verður eisini upp, at øll ferðafólk skulu fylgjast í smærri bólkum við góðkendum ferðaleiðara."

Undir punkti 1.1 í viðmerkingunum til uppskotið verður ført fram "... at tørvur er á at skipa ferðavinnuna á ein slíkan hátt, at hon í størst møguligan mun er fólki og landi til gagns."

Vit eru av tí fatan, at ferðavinnuætlanin, sum varð samtykt á Grannastevnu í 2017 av sonnum er burðardygg ferðavinna, tí hon á ein skipaðan hátt ger avmarkingar í rættinum hjá øllum at fara allastaðni, tá tey vilja, har tey vilja og uttan at siga frá. Samstundis hevur samtyktin lagt lunnar undir eina vaksandi lokala ferðavinnu og skapt fíggjarligar møguleikar fyri at fríðka bygd og oyggj umframt at stuðla hagapørtunum og harvið landbúnaðinum í oynni.

Sæð í hesum ljósi er tað sera ørkymlandi og ikki sørt hugstoytt at lesa uppskotið til ferðavinnulóg.

Hetta, tí lógin fullkomiliga tekur grundarlagið undan samtyktini, avmarkingunum, inntøkumøguleikunum og heimildunum hjá eigarum og festarum at ráða yvir teimum ognum, teir sambært galdandi lóggávu eiga ella hava ræðisrætt á. Tað gerst enn verri, tá tað sum kemur í staðin, als ikki fremur eina burðardygga ferðavinnu við atliti náttúru, fugla- og djóralívi og nærumhvørvi.

1. Avtøka ella avmarkingar av ræðisrætti

Ásetingarnar í lógini tykjast hava eittans høvuðsendamál, nevniliga at innføra almannarættin. Hetta verður gjørt við taka ræðisrættin frá teimum, sum eiga ella á annan hátt hava havt nýtslurættin yvir matrikuleraðu uttangarðsjørðini í Føroyum, sí § 3 í uppskotinum "... er einum og hvørjum frítt at ferðast uttangarðs og fram við strondini."

Avmarkingarnar í fría rættinum hjá einum og hvørjum eru givnar í somu lóg ella øðrum løgtingslógum og fyriskipanum.

Í § 4 eru ásetingar um atburð og rættin hjá eigara ella festara rætt at vísa burtur fólk. Treytin er tó, at hesi bera seg fyrilitarleyst at ella er ognini at skaða ella ampa.

Viðmerkingarnar er sera óítøkiligar, tá tað snýr seg um allýsingina av hugtøkunum nevnd omanfyri. Hinvegin eru tær sera ítøkiligar, tá tað snýr seg um at gera avmarkingar í teimum møguleikunum eigari ella festari hevur heimild at gera.

Ræðisrætturin verður fullkomiliga tikin frá eigara ella festara í §5. Høvuðsreglan fyri handilsligari ferðavinnu kann bert útinnast í samráð við eigara ella festara (brúkara) sambært stk. 1.

Hagapartarnir Mykines
388 Mykines
E-mail: mykines.tourist@gmail.com

Í stk. 2 verður heimildin at nokta fyri handilsligari ferðavinnu tikin frá eigara og festara. Víst verður tó til § 12, stk. 3 og rættin at krevja eina standard avtalu, sum landsstýrismaðurin skal gera, sí stk. 3.

Úrslitið av hesi áseting er, at kann eigari ella festari ikki náa til eina fyri báðar partar skilagóða samstarvsavtalu, so hevur eigari ella festari ikki heimild at nokta handilsligari ferðavinnu á uttangarðsjørð, hann eftir øðrum lógum hevur ræðisrættin yvir.

Í §§ 6 og 7 verður álagt kommunum og staðbundnu nevndini at gera eina ferðavinnuætlan.

Eisini hesar greinar avmarka rættin hjá eigara og festara til at ráða yvir jørðini, sambært reglunum um hagastevnu og grannastevnu. Tí sambært hesari lóg verður rætturin avmarkaður av almannarættinum og handilsligari ferðavinnu.

Eftir § 8 kann kommunan í samráð við eigari ella festara gera skilhaldsreglur, sum tó ikki skulu avmarka almannarættin meira enn neyðugt. Aftur her er tað landsstýrismaðurin, sum skal góðkenna skilhaldsreglurnar og lýsa tær í kunngerð.

§ 11 fær landsstýrismaðurin heimild at gera kunngerð um avmarkingar í økjum, sum vera mett at vera "serliga vandamikil at ferðast í".

Eftir § 12 skal landsstýrimaðurin í kunngerð áseta nærri reglur um almannakunngerð av avmarkingum.

Sambært stk. 1 verður rætturin hjá eigara ella festara til skilagóðar forðingar avmarkaður av rættinum hjá fólki at útinna síni rættindi eftir hesi løgtingslóg.

Samanumtikið vísa ásetingarnar omanfyri, at almannarætturin, ferðavinnuætlanin og rætturin hjá heimafólki vigar tyngri enn rætturin hjá eigara ella festara. Avgerandi orðið í øllum viðurskiftum er tikin frá eigara og festara og lagdur til onnur og avgerandi orðið hevur landsstýrismaðurin.

Hagapartarnir Mykines
3SÁ Mykines
E-mail: mykines.tourist@gmail.com

2. Fíggjarliga ávirkanin á lokalu ferðavinnuna í Mykinesi

Avleiðingarnar fyri vinnuna verða nevndar undir punkti 2.3 og tær verða sum heild mett positivar.

Tað er óivað rætt, at økt ferðafólkatal fer at hava eina jaliga ávirkan á vinnuna sum heild, men fyri lokalu, staðbundnu ferðavinnuna í Mykinesi verður hetta ein ólukka, ja so ógvuslig, at hon væntandi dettur fyri bakka.

Hetta byggir á royndirnar hjá okkum, og tær upplivingar bygd og oyggj hava havt av ferðavinnuni, serliga síðani hon tók dik á seg.

Áðrenn grannastevnu samtyktina øktist tali av ferðafólkum munandi. Sambært hagtølum frá Strandferðsluni úr 10.028 seldum ferðaseðlum (5.024 ferðandi) í 2013 í 19.530 (9.765 ferðandi) í 2016. Tað finnast eingi hagtøl, ið vísa eina sundurgreining av teimum, sum ferðaðust, men hyggja vit at gjaldandi ferðafólkum seinnu árini, so hevur meginparturin undanfarnu árini avgjørt verið útlendsk ferðafólk.

Talið av gjaldandi ferðafólkum er økt úr 12,5% í 2017 í 74,1% í 2023. Í 2017 rindaðu føroyingar eisini gongugjald, men hetta varð broytt við virknaði frá 2019. Í 2017 var eingin skipað innkrevjing ella eftirlit, og hetta var høvuðsorsøkin til lítlu inntøkuna.

Í 2018 tók hiking.fo við Pól Sundskarð sær av at røkja uppgávuna at hava eftirlit við, at ferðafólkini høvdu rindað og ansaðu eftir, at ferðafólkini hildu seg á gøtuni út í hólm. Við virknaði frá 2019 tók Sp/F Mykines sær av innkrevjing og eftirlitsuppgávuni. Hetta sæst eisini aftur í talinum av gjaldandi ferðafólkum, sum hesi ár lá um 62 – 65 % av teimum ferðandi. Í hesum tali eru bara útlendsk, vaksin ferðafólk.

Afturgongdin í ferðafólkatalinum í 2020 stavar frá Covid 19, ið førdi við sær færri útlendingar og at føroyingar ferðast í egnum landi. Hetta helt fram í 2021, tá talið av gjaldandi, útlendskum ferðafólkum fall niður á góð 37%. Tað árið var eingin atgongd út í Hólm og einki eftirlit var við ferðafólkunum. Tvs. at tað vóru bara tey, sum ynsktu at gjalda, ið rindaðu.

Frá 2022 hevur The Locals við Katrinu Johannesen í Mykinesi havt uppgávuna um hendi at hava eftirlit og frá 2023 eisini at taka sær av at útvega ferðaleiðarar til skipaða túrin, sum Hagapartarnir Mykines hava bjóðað ferðafólkunum.

Túrurin við gongugjaldi og ferðaleiðara verður seldur á hiking.fo fyri 400 krónur. Umframt hetta tilboð, hava aðrir føroyskir, ferðasmiðir marknaðarført og selt túrar til Mykinesar. Einasta krav hevur verið, at ferðasmiðirnir og teirra ferðaleiðarar eru góðkendir at ferðaleiða í Mykinesi. Bruttoinntøkan frá ferðasmiðunum er 250 krónur fyri hvørt ferðafólkið.

Talið av útbjóðaðum túrum á hiking.fo og Guide to Faroe Islands er áleið 15 – 20 í tali og í 2023 høvdu umleið 12 – 16% av ferðafólkunum keypt túrar frá føroyskum ferðasmiðjum, meðan restin valdi at keypa túrin, sum Hagapartarnir Mykines bjóðaði, og The Locals tók sær av. Hesin túrur er eisini tann við lægsta prísinum.

Sum áður fráboðað verður prísurin og avtalurnar við føroysku ferðasmiðirnar óbroyttar í 2024. Verður lóggávan óbroytt, og ferðafólkatalið økist við umleið 10% í mun til 2023, verða tølini fyri 2024, sum víst niðanfyri.

Hagapartarnir Mykines
388 Mykines
E-mail: mykines.tourist@gmail.com

Ferðafólk		Prísur	Harav gongu-gjald	MVG av gongu-gjaldi	Netto-inntøka
Hagapartarnir Mykines		400	250	-50	350
Egin túrur, à 400 kr.	9.000	3.600.000	2.250.000	-450.000	3.150.000
Føroyskir ferðasmiðir, à 250 kr.	1.200	300.000	300.000	-60.000	240.000
Tilsamans	**10.200**	**3.900.000**	**2.550.000**	**-510.000**	**3.390.000**
Umsiting og løn til ferðaleiðarar					-1.293.000
Bruttovinningur					**2.097.000**
Skattur av ársúrsliti					-1.027.530
Úrslit aftaná skatt					**1.069.470**
Beinleiðis meirvirðisgjald og skattur av ferðavinnuni í Mykinesi					1.537.530
Lands- og kommunuskattur av ferðaleiðarlønum, 30%					323.250
Inntøka til landskassan og Sørvágs kommunu tilsamans					**1.860.780**

Miðalprísur fyri hvørt ferðafólki, íroknað meirvirðisgjald	382
Umsiting og løn til ferðaleiðarar, áðrenn skatt	-127
Inntøka til landskassan og Sørvágs kommunu fyri hvørt ferðafólk	-182
Hagapartarnir Mykines av hvørjum ferðafólki	**105**

Í tølunum omanfyri eru ikki útreiðslur til viðlíkahald, fríðkan og gerð av nýggjum gøtum v.m. frádrigið. Hetta, fyri at tølini eru sambærlig við fíggjarligu tølini um nýggja lógin verður samtykt.

Áðrenn grannastevnu samtyktina, høvdu ferðafólkini frítt at fara uttan ferðaleiðara og føroysku ferðasmiðirnir skipaðu eisini fyri túrum við ferðaleiðara, og øll fóru tey út í Hólm.

Inntøkurnar í bygdini vóru ikki serliga stórar og meginparturin, áleið 90%, vóru ferðafólk uttan føroyskan ferðaleiðara ella ferðaleiðara yvirhøvur. Ferðasmiðirnir í miðstaðarøkinum brúktu í ávísan mun lokalar ferðaleiðarar. Burtursæð frá hesari lokal inntøku, rindaði eingin nakað til ognarar og festarar fyri rættin at brúka ognirnar hjá teimum.

Verður uppskotið til ferðavinnulóg samtykt uttan rættin hjá teimum, sum eiga ella umsita uttangarðsjørðina at fáa annað enn ein lutfalsligan part av tí samlaða náttúrugjaldinum, ið ætlanin er at krevja inn, so eru fortreytirnar fyri Hagapartarnir Mykines at reka eina burðardygga ferðavinnu við atliti til náttúruna, fugla- og djóralívið og nærumhvørvi burturi.

Tað er trupult at meta um hvussu lutfalsliga býti verður millum ymsu ferðamálini í Føroyum. Givið at lutfalsliga býti verður, at 20% koma til Mykinesar svarar hetta til 20% av 150 krónum = 30 krónur.

Hagapartarnir Mykines
388 Mykines
E-mail: mykines.tourist@gmail.com

Talvan niðanfyri vísir inntøkurnar í 2024 um lógin var komin í gildið.

Ferðafólk		Túrur	Harav gongu-gjald	MVG av gongu-gjaldi	Netto-inntøka
Parturin hjá Mykines 20% av 150 krónum		30	0		30
Tal av ferðafólkum	10.200	306.000	0	0	306.000
Hagapartarnir Mykines, 25%		76.500			76.500
Skattur av úrslitinum					-37.485
Hagapartarnir Mykines aftaná skatt					**39.015**
Parturin hjá Mykines bygd, 25%		76.500			76.500
Parturin hjá Mykines tilsamans					**115.515**
Parturin hjá Sørvágs kommunu, 50%		153.000	0	0	153.000
Miðalprísur fyri hvørt ferðafólk					30
Umsiting og løn til ferðaleiðarar, áðrenn skatt fyri hvørt ferðafólk					0
Inntøka til landskassan og Sørvágs kommunu fyri hvørt ferðafólk					-19
Hagapartarnir Mykines av hvørjum ferðafólki, aftaná skatt					4

Í Sørvágs kommunu eru fleiri væl vitjaði ferðamál og tí ber ikki til at rokna við, at Mykines fær allan ágóðan av partinum hjá kommuni. Parturin hjá Sørvágs kommunu røkkur ikki at gera nógvar gøtur.

Tað er ikki neyðugt at gera tær stóru viðmerkingarnar til tølini omanfyri. Tølini vísa heilt greitt, at almannarætturin, misti rætturin til at krevja gongugjald fráferðafólkum og handilsligu ferðavinnuni ella á annan hátt forða øðrum at reka ferðavinnu á jørðini, sum eru vinnutól hjá eigarum og festarum førir við sær, at inntøkugrundarlagið er burturi. Inntøku missurin minkar við 96% úr 105 krónum í 4 krónur fyri hvørt ferðafólkið.

Við lógaruppskotinum fara vit aftur til støðuna áðrenn grannastevnu samtyktina í 2017. Tvs. meginparturin av ferðafólkunum koma uttan ferðaleiðara og restin við ferðasmiðum úr miðstaðarøkinum ella útlandinum.

Sjálvsagt forðar hetta ikki bygdarfólkinum at skipa fyri túrum við ferðaleiðara, men tað er ein søgulig sannroynd, at meginparturin av ferðafólkunum ikki ynskja ferðaleiðara ella á annan hátt leggja munandi peningaupphæddir eftir sær í oynni.

Tey vilja ganga, har tey vilja, tá tey vilja og uttan at siga nøkrum frá.

Hagapartarnir Mykines
388 Mykines
E-mail: mykines.tourist@gmail.com

3. Burðardygg ferðavinna

Lógaruppskotið hevur fleiri orðingar um neyðugt atlit til at skipa eina burðardygga ferðavinnu. Flest allar hesar eru ella skulu lýsast í kunngerðum og ferðavinnuætlanum, ið ikki eru gjørdar áðrenn lógin kemur í gildið.

Ásetingini í § 17, um at lógin kemur í gildið dagin eftir, hon er kunngjørd, er alt annað enn burðardygg ferðavinna.

Avleiðingin er, at allur rættur eftir núverandi lóggávu verður settur til viks av ásetingunum í Ferðavinnulógini, sum als ikki er klár at seta í staðin.

Orsøkin er einføld, nevniliga at alt undirstøðukervið undir lógini als ikki er gjørt. Kommunurnar hava til 1. juni 2025 at orða ein ferðavinnupolitik, velja umboð í serstøku ella staðbundnu nevndirnar umframt finna útav um tørvur er at seta fleiri fólk í starv. Landsstýrismaðurin skal orða kunngerðir, góðkenna ferðavinnupolitikkin og gera standard avtalur v.m.

Við lógini í hondini verður ræðisrætturin tikin frá ognarum og festarum, ferðafólkini hava frítt at fara har tey vilja, tá tey vilja og uttan at siga nøkrum frá. Sama rætt fær handilsliga ferðavinnan.

Verður hesin leistur brúktur, livir lógin yvirhøvur ikki upp til endamálsorðingarnar í § 1, stk. 1 "Ferðavinna skal í øllum lutum skipast á burðardyggum grundarlagi ... "

Nærum allastaðni í lógini, har nomið verður við náttúruvernd, verður tað avmarkað av ásetingum um " ... skal vera so avmarkað sum gjørligt.", forboð hjá eigara ella festara at nokta, góðkenning frá landsstýrismanninum ella á annan hátt taka onnur atlit enn burðardygg atlit.

Styrkin á náttúruverjuni kann setast upp á henda hátt, har styrkin er størst í punkti 1 og vánaligast í punkti 5 :

1. Forboð móti at ganga í náttúruni
2. Avmarkingar í hvar og nær farast kann burtur í haga ella fjallatind
3. Ferðafólk skulu fylgjast við góðkendum ferðaleiðara
4. Gøtur lagdar á røttum staði
5. Áliti á teimum sum fara burtur í haga

Ferðavinnulógin metir frælsi hjá tí einstaka heimsborgaranum so høgt, at punkt 1 og 2 í minst møguligan mun skulu vera galdandi. Undantikið er tó har tað verður mett sera vandamikið at ferðast.

Kravið um ferðaleiðara verður eisini avmarkað mest møguligt. Aftur her tykist frælsi hjá tí einstaka at viga tyngri enn náttúruverndin.

Hagapartarnir Mykines
388 Mykines
E-mail: mykines.tourist@gmail.com

4. Aðrar viðmerkingar

Í viðmerkingunum til uppskotið verður undir punkt 2.3 Avleiðingar fyri vinnuna, sum rætt er, víst á øktar inntøkur til ferðavinnuaktørarnar í miðøkinum. Somuleiðis verður nevnt landbúnaðarferðavinna.

Spírandi lokalu ferðavinnutilboðini verða als ikki nevnd, men ístaðin víst á, at Ferðavinnulógin við vælskipaðari ferðavinnu úti um landið kann økjast og skapa lív og trivnað. Einki verður nevnt um, at henda lóg í fyrsta lagi tekur grundarlagið undan núverandi lokal loysnum og samstarvi við handilsligu ferðavinnuna, sum finst í dag.

Lógaruppskotið er helst ætlað sum "Constructive Destruction", tvs. ein tilvitað niðurbrótan av einari lokalari ferðavinnu til frama fyri eina nýggja byrjan, sum er meira í samljóð við hugsjónina hjá landsstýrismanninum og ávísum áhugabólkum.

Fyri okkum í Mykinesi er lógaruppskotið nærri at meta sum "Destructive Destruction", ið fullkomiliga tekur grundarlagið undir siðvenjuni um lokalan ræðisrætt yvir dynamiska hugtakinum lunnindir, avmarkingar í heimildini hjá eigarum og festarum á haga- og grannastevnu at reka nærumhvørvið til fyrimuns fyri tey, sum eiga ella umsita uttangarðsjørðina og lunnindini. Alt til fyrimuns fyri fremmand ferðafólk, sum í mest møguligan mun ikki skulu avmarkast í atgongdini til føroysku náttúruna og í flest førum sleppa undan at gjalda annað enn náttúrugjaldið við komu til landið.

Umsitingarligu avleiðingarnar av innkrevjingini eru munandi truplari enn viðmerkingarnar til lógina leggja upp til. Altjóða bókingarskipanir í flogferðsluni, sum skulu halda skil á, hvørs ein ferðaseðil er seldur einum útlendskum ferðafólki ella einum føroyingi osfr.

Í viðmerkingunum verður einki nevnt um skattligu ávirkanina av lógaruppskotinum fyri eigarar.

Eftir verðandi lóggávu javnmetir TAKS gongugjaldið við eitt atgongumerki, og harvið skal meirvirðisgjald rindast. Tá einstøku økini fáa inntøkur í mun til talið av ferðafólki er ikki óhugsandi, at TAKS eisini javnmetir hetta við eitt atgongumerki og harvið skal 20% av upphædddin rindast sum meirvirðisgjald.

Parturin, ið fellur til eigara ella festara, er óivað skattskyldug og tískil verður nettovinningurin aftaná møguligt meirvirðisgjald og skatt uppaftur minni.

Hagapartarnir Mykines
388 Mykines
E-mail: mykines.tourist@gmail.com

5. Tilmæli

Óavmarkaður almannarættur verður ongantíð burðardyggur. Hetta tykist eisini verða greitt fyri landsstýrismannin, tí lógaruppskotið nevnir møguleikarnar fyri at gera avmarkingar í kunngerð og ferðavinnupolitikkinum.

Tað er eingin loyna, at Hagapartarnir Mykines ikki eru glaðir fyri hetta lógaruppskot, tí tað ger so ógvuslig inntriv í ræðisrættin hjá ognarum og festarum. Okkara fatan er, at hesi inntriv liggja so tætt at ella er beinleiðis brot á §73 í Grundlógini um "ejendomsrettens ukrænkelighed"

Tilmæli 1 – nýtt lógaruppskot

Tí verður mælt til, at landsstýrismaðurin í fyrsta lagi tekur lógaruppskotið aftur og seriøst setur seg saman við ognarum og festarum og ger eitt nýtt lógaruppskot.

- ið gevur vanliga føroyinginum ein skipaðan rætt til at fara út í føroysku náttúruna,
- ið varðveitir ræðisrættin hjá ognarum og festarum til at gera neyðugar avmarkingar í atgongdini,
- ið varðveitir ræðisrættin hjá ognarum og festarum til at krevja staðkendar/góðkendar ferðaleiðarar,
- umframt møguleikan fyri at krevja gjald frá handilsligu ferðavinnuni fyri rættin at gagnnýta ognarans ella festarans vinnuogn.

Tilmæli 2 - Almannarættur

Velur landsstýrimaðurin ikki taka lógaruppskotið aftur, so er sera umráðandi, at almannarætturin ikki verður settur í gildið, fyrrenn fortreytirnar fyri honum er uppfyltar. Tvs. at neyðugar árinskanningar eru gjørdar, kunngerðir lýstar, ferðavinnupolitikkur gjørdur og aðrar neyðugar atgerðir eru framdar.

Hetta merkir, at almannarætturin verður innførdur stigvíst og ikki skjótari enn at burðadygga verjan av náttúruni, fugla- og djóralivinum fylgir við.

Tilmæli 3 - Náttúrgjald

Verandi uppskot um náttúrugjald og býtið av hesum er, sum víst áður alt ov lítið, alt ov ógreitt og alt ov trupult at krevja inn og óneyðuga tungt umsitingarliga.

Ynskir landsstýrimaðurin framhaldandi, at tað almenna skal krevja inn náttúrugjald, eigur hetta at vera gjørt við einum teldustýrdum ferðakorti, har ferðamaðurin keypir sær rætt til ávís støð. Hetta teldustýrda ferðakortið eigur at vera gjørt í samráð við ognarar og festibóndir.

Náttúrugjaldið eigur ikki at forða fyri rættinum hjá ognarum og festarum at krevja gjald fyri nýtslurætt hjá handilsligu ferðavinnuni á teimum matriklum ognari ella festari hevur.

Tilmæli 4 – Varveita staðbundna avgerðarrættin

Uppskotið um ferðavinnulóg gevur landsstýrismanninum, kommunum og heimafólki meginpartin fyri ikki at siga allar heimildir, sum í dag liggja hjá ognara og festara. Ja, enntá hvør heimsborgari fær rættuliga stóran rætt.

Við lógini verður rætturin hjá Haga- og Grannastevnu, lokalu friðingarnevndunum og Yvirfriðingarnevndini avmarkaður av ásetingunum í Ferðavinnulógini.

Tvs. at ræðisrætturin hjá ognarum og festarum í nærum øllum førum verður fluttur til onnur at ráða yvir.

Okkara tilmæli er, at staðbundni avgerðarrætturin verður handhevjaður sum higartil.

Tað er eisini sera ørkymlandi, tá ræðisrætturin til at gera reglur osfr. verða lagdar í kunngerðir og avgerðir verða tiknar í landsumsitingini heldur enn í Friðingar- og Yvirfriðingarnevndini.

Hagapartarnir Mykines
388 Mykines
E-mail: mykines.tourist@gmail.com

Grundgevingin fyri hesum er, at samstarvið við almennu stovnarnar í Ramsar nevndini og leiðsluna í Visit Faroe Islands kundi verið munandi betri. Í fleiri førum hava hesir lagt fótonglar ella beinleiðis mótarbeitt arbeiðið at menna ferðavinnuna í oynni, væntandi áhuga fyri at hjálpa í implementeringini av okkara lokalu ferðavinnuætlan við grannastevnuni. Álitið á VFI fór endaliga fyri bakka, tá farið var undir at gera gøtuna úti í Lamba og VFI saman við fleiri almennum stovnum meldaðu Hagapartarnar til Friðingarnevndina og Yvirfriðingarnevndini.

Lukkutíð høvdu vit Yvirfriðingarnevndina, sum gav hagapørtunum viðhald, og tí eru vit sera ørkymlaði av, at týdningarmiklar avgerðir ikki kunnu koyrast ígjøgnum ein sera vælvirkandi part av okkara rættarskipan, men ístaðin leggjast til landsstýrismannin og hansara fyrisiting at taka endaligar avgerðir.

Tilmæli 5 – lunnindir

Lunnindir fylgja jørðini og er eitt dynamiskt hugtak, ið broytist yvir tíð. Lunnindir liggja at jørðini, og tað er umráðandi, at ferðavinnan eins og øll onnur lunnindir framhaldandi liggja hjá jørðini, og at nýtslurætturin verður stýrdur av ognara og festara.

Samandráttur

Lógin og viðmerkingarnar til hana eru rúgvusmiklar, men góðu ætlanirnar um eina burðardygga ferðavinnu í lokaløkinum og vaksandi inntøkumøguleikar í nærumhvørvinum, verða als ikki uppfyltar í lógartekstinum.

Fíggjarligu avleiðingarnar eru, sum vístar omanfyri undir punkt 2, altoyðileggjandi fyri lokalu ferðavinnuna í Mykinesi og óivað eisini í fleiri øðrum støðum, har talið av ferðafólkið er sera stórt. T.d. Trælanípuna, Teigarnar, Slættaratind og Kallin.

Inntøkumissurin verður sera stórur, og lokalu abeiðsplássini gerast til nærum eingi.

Bert í einum føri tykist lógin at røkka sínum endamáli, nevniliga við at innføra almannarættin og taka ræðisrættin fullkomuliga frá ognarum og festarum. Var skilið ikki gott við verðandi skipan, so verður tann fleiri ferðir verri við nýggju skipanini.

Tí er tað okkara greiða fatan, at verandi uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin) er ein vanlukka fyri náttúru, fugla- og djóralív, nærumhvørvið og bygdirnar í útjaðaranum.

Lógaruppskotið má tískil ikki leggjast fram á Føroya Løgtingi og enn minni samtykkjast.

Landsstýrismaðurin eigur í staðin at seta seg sjálvan við borðendan saman við umboðum fyri jørðina og lurta eftir, hvat umboðini fyri ognarar og festarar hava av tilmælum.

Somuleiðis átti landsstýrimaðurin at lurta eftir og sett seg inní, hvussu staðbundna ferðavinnan virkar bæði lokalt og í samstarvi við føroysku ferðasmiðirnar.

Landsstýrimaðurin átti eisini at gjørt neyðugar broytingar í viðtøkunum fyri VFI, so 1 – 2 nevndarlimir vórðu innstillaðir av óðalsfólki og festarum.

Er eitthvørt ógreitt, eru vit áhugaði í at møta á fundi við landsstýrimannin.

Finn Danberg, formaður
Hagapartarnir Mykines